B36-HB 2-0 (1-0):

B36 staðfesti silvurið

B36 vann eisini fjórðu grannauppgerðina á árinum, og tryggjaði sær harvið silvurmerkini í kvinnudeildini

Kvinnuliðið hjá B36 er aftur í ár silvurvinnarar, og hetta staðfestu tær við at vinna seinasta dystin á grannunum úr HB

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað var mest sum staðfest longu undan seinasta umfarinum, at silvurið í kvinnudeildini fór at enda hjá B36.

Gaman í var bert eitt stig millum B36 og hitt árstalsfelagið undan dystinum, B68, men tá toftakvinnurnar skuldu royna seg í Klaksvík, mundi tað vera lítið sannlíkt, at B68 fór at yvirhála.

Til tess kravdist eisini, at B36 setti stig til móti HB, men tann ivan sópaði B36 sjálvar av borðinum við fjórða sigrinum í ár á grannunum.

Greið yvirvág

Tað var eisini B36, sum allan dystin var betra liðið. Frá fyrsta bríksli løgdu tær eitt stórt trýst oman móti HB-málinum, og tó at HB royndi at muta nakað ímóti, so var greitt, hvønn vegin tað bar.

Farast skuldi tó um miðjan hálvleikin, áðrenn trýstið og leikliga yvirvágin gav úrslit. Fram til tá hevði Randi Wardum hildið skansan í HB-málinum, men tá Súsanna Hansen gjørdist púra leys, eftir góða fríspæling frá Arnbjørg Danielsen, var eisini hon prísgivin.

B36 helt eisini eftir málið á við at trýsta HB, men størsti møguleikin av øllum fyri steðgin fall tó til HB. Eyðfrið Kristiansen, sum í stóran mun hevur verið álitið hjá HB í ár, varð feld í B36 brotsteiginum, og dómarin ivaðist ikki. Malan á Dunga varð sett at taka sær av brotssparkinum, men Elsa Maria Olsen í B36 málinum gitti rætt, og so kundi B36 draga andan nakað lættari, tá tær fóru inn til steðgin, meðan lagið í HB-húsinum helst hevði verið betri, um brotssparkið var gagnnýtt á rættan hátt.

Í seinna hálvleiki var býtið av spælinum á leið hitt sama, men tað gekk framvegis meira enn striltið hjá B36 at umseta yvirvágina til mál. Tað líktist fyri tað mesta einum teprum sigri, men í seinastu minuttunum fekk Maria í Brekkunum sett trumf á, tá hon við sínum fyrsta málið í ár syrgdi fyri, at B36 fekk ein góðan enda upp á kappingarárið.

At B68 so tapti sín dyst í Klaksvík, kann fyri B36 vera tað sama. Tær greiddu sín setning, og vunnu tí aftur í ár silvurmerkini, sum tær mest sum hava tikið patent uppá, nú KÍ tykist hava einarætt til gullið.

Dysturin í tølum
B36-HB 2-0 (1-0)
1-0: Súsanna Hansen
2-0: Maria í Brekkunum

Støðan, 1. deild kvinnur

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál munur	stig
1	KÍ	10	10	-	0	-	0	46	7	39	33
2	B36	10	7	-	0	-	3	27	16	11	23
3	B68	10	6	-	0	-	4	17	18	-1	19
4	GÍ	10	3	-	1	-	6	16	29	-13	10
5	HB	10	2	-	2	-	6	15	19	-4	8
6	Skála	10	0	-	1	-	9	14	46	-32	1

Máltindurin, kvinnur

Rannvá Andreasen	KÍ	20
Malena Josephsen	KÍ	12
Arnbjørg Danielsen	B36	7
Majbritt Olsen	B68	7
Ása á Neystabø	B36	6
Heidi Heinesen	GÍ	6
Eyðfríð Kristiansen	HB	5
Elsa Maria Simonsen	KÍ	5
Vivian Bjartalíð	Kí	5
Anja Weihe	B36	4
Súsanna Hansen	B36	4
Elin Jacobsen	Skála	4
Laila Enghamar	B36	3
Hansy Davidsen	B68	3
Anna Berg Danielsen	Skála	3
Poula D. Olsen	Skála	3
Mara Vang	B36	2
Mary-Ann Isaksen	B68	2
Eyðvør úr Dímun	HB	2
Malan á Dunga	HB	2
Vivian Unadóttir	HB	2
Jensa Sirdal	Kí	2
Maria í Brekkunum	B36	1
Anna Malena Højgaard	B68	1
Anna Maria Kruse	B68	1
Maibritt Kruse	B68	1
Oddvá Kristiansdóttir	B68	1
Sóley Philbrow	B68	1
Anja Klæmintsdóttir	GÍ	1
Anna Kristina Joensen	GÍ	1
Barbara Knudsen	GÍ	1
Judy Justinussen	GÍ	1
Ása úr Dímun	HB	1
Gunn Müller	HB	1
Kristina Simonsen	HB	1
Linda Jacobsen	HB	1
Una Olsen	KÍ	1
Elin Højsted	Skála	1
Gerda Magnussen	Skála	1
Jóna Petra Thomsen	Skála	1
Ninna Johansen	Skála	1
sjálvmál		2

Besti málskjúttin í kvinnudeildini, sum í ár er Rannvá Andreasen, fær gylta skógvin, sum Sosialurin og Thomas Dam Ítróttur lata

Skála-GÍ 2-9 (1-4):

Endaðu við stórsigri

Gøtukvinnurnar gjørdu bart, tá tær í seinastu umfarinum hølvaðu niðurflytararnar av Skála ígjøgnum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Undan seinasta umfarinum í bestu kvinnudeildini hevði GÍ bert skotið sjey mál í endaspælinum, men hetta talið varð meira enn tvífaldað á Skála.

Heili 9-2 gjørdist úrslitið, og longu eftir fyrsta fjórðingin av dystinum, var mest sum alt avgjørt. Tá hevði GÍ longu havt bóltin í Skála málinum fýra ferðirnar, og eftir hetta tóktist tað bara vera ein spurningur um, hvussu stórur sigurin hjá GÍ skuldi vera.

Í seinna hálvleiki helt Skála tó leingi fast um dystin, soleiðis at talan ikki skuldi gerast um rættiligt sorl, men seinastu tíggju minuttirnar av dystinum skoraði GÍ fýra ferðir afturat. Eftir øllum at døma hevur hetta gingið skjótt fyri seg, tí sjálvt dómarin megnaði hesa løtuna ikki at fylgja við í málskjótingini, og fekk hann ikki stundir at skriva málskjúttarnir hjá GÍ niður.

Við trivaliga sigrinum vann GÍ seg upp á fjórða plássið í kappingini, soleiðis at tað ístaðin verður HB, sum nú skal dystast um at sleppa at halda fram í deildini.

Dysturin í tølum

(tíverri hevur ikki eydnast at fáa nøvnini á øllum málskjúttunum)
Skála-GÍ 2-9 (1-4)
0-1: Anja Klæmintsdóttir
0-2: Barbara Knudsen
0-3: Heidi Heinesen
0-4: Heidi Heinesen
1-4: Anna B. Danielsen
1-5: ???
2-5: Ninna Johansen
2-6: ???
2-7: ???
2-8: ???
2-9: ???

Fimleikurin aftur í gongd

Nú fimleikaárið er byrjað aftur, skipaði Havnar Fimleikafelag fyri tilmelding á Stórheyggi leygardagin, 31. august. Nógv møttu, og lagið var gott, tá allir fimleikararnir hittust til enn eitt fimleikaár

FIMLEIKUR
Tíðindaskriv

Tilmeldingin til Havnar Fimleikafelag setti met í vetur, og fleiri noyddust avstað aftur, tí ymsu liðini vóru fullteknað

Verður tikið samanum, so gekk tilmeldingin stak væl, og nevndin fór væl nøgd til húsa aftur – eisini tí met varð sett í tilmelding, tá ikki færri enn 911 fimleikarar teknaðu seg til fyri veturin.

Farna vetur vóru umleið 1.100 limir í Havnar Fimleikafelag, og í ár roknar nevndin við á leið sama tali. Høvuðsorsøkin til, at HF ikki metir vøksturin í ár at vera nakran serligan er, at hølisviðurskiftini og venjaraspurningurin seta síni krøv.

Grundað á stóra áhugan at íðka fimleik í felagnum, hevur nevndin saman við venjaranum gjørt av at seta mark fyri, hvussu nógvir limir kunnu venja á hvørjum liði. Um felagið skal varðveita trygdina hjá limunum og dygdina í felagnum, er avgerðin alneyðug.

Felagið kann ikki hýsa øllum, ið ynskja at íðka í fimleik í felagnum. Hóast felagið í høvuðsheitum er í høllini á Stórheyggi, og har hevur møguleika at skilja høllina í tvær hallir, soleiðis at tvey lið kunnu venja í senn, er hetta ikki nøktandi í mun til tað, sum felagið kundi hugsað sær at fyriskipað.

Avgerðin er ikki, og óivað eru fleiri, ið eru komin á gátt, men sum hava verið noydd at venda við, tí liðið, sum tey ynsktu at venja við, var fult teknað. Nevndin er sera hørm um hetta, men sum sagt er avgerðin alneyðug,

Fyri í stuttum at nevna tiltøkini, hetta til jóla, so verður fvíst á, at rútmudagur, stuðulsrenning, amboðsdagur, venjingar til fagnaðin og venjingarlega fyri stórkappingarlið verða fyriskipað afturat »FM-skúlanum« og føstu venjingartímunum.

Allar fyrireikingar, ið nevndin í Havnar Fimleikafelag hevur arbeitt við, hetta til fimleikabyrjanina 2002/2003, eru lagdar til rættis, soleiðis at allir fimleikararnir, nýggir sum royndir og ungir sum eldri, aftur í vetur kunnu fáa avbjóðingar og upplivingar í størsta fimleikafelagnum í landinum.

KÍ tosar við Johan

Johan Nielsen tykist vera væl áleiðis til Klaksvíkar, eftir at tað fyrr í ár gjørdist greitt, at hann ikki heldur fram í Gøtu

Søgurnar senda Johan Nielsen til Klaksvíkar. Formaðurin í KÍ sigur, at Johan er millum evnini, men at enn er eingin støða tikin

VENJARAR
Jákup Mørk

Sunnukvøldið stóð greitt, at Kurt Mørkøre ikki verður venjari hjá KÍ komandi kappingarárið, tí hann í næstum flytir til Noregs.

Leiðslan í KÍ boðaði samstundis frá, at teir hava havt onkrar følarar úti eftir nýggjum venjarum, og at teir nú eru í ferð við at kanna, hvussu møguleikarnir fyri hesum eru.

Síðani hetta hava søgurnar gingið um komandi venjaran, og tær mest álítandi av slagnum hava sent ein hin mest roynda og í øllum førum mest vinnandi føroyska venjaran til Klaksvíkar.

Talan er um Johan Nielsen, sum fyri fáum vikum síðani boðaði frá, at hann ikki verður venjari hjá GÍ komandi kappingarárið. Umframt tey ellivu árini í Gøtu har europeisk luttøka hevur verið fastur táttur, hevur Johan eisini í drúgt tíðarskeið verið venjari hjá HB, har hann kanska meira enn nakar annar legði lunnar undir gyltu sjeyti- og áttatiárini hjá felagnum.

At nakað er um tosið, er lítið at ivast í, men sambært formanninum í KÍ, Gestur Hovgaard, er enn alt ov tíðliga at staðfesta, hvør verður KÍ-venjari komandi kappingarár.

- Nú eru bara tveir dagar síðani, at vit fingu endaligu boðini frá Kurt, so enn hava vit so ikki gjørt nakra avtalu við nakran venjara, segði Gestur Hovgaard, tá vit týsmorgunin royndu at fregnast um venjaraspurningin.

Spurdur beinleiðis, um KÍ hevur havt samráðingar við Johan Nielsen, sigur formaðurin, at samband hevur verið millum partarnar.

- Johan er jú ein av teimum allar bestu venjarunum, sum eru í landinum, so tað vildi verið løgið, um hann ikki taldist millum evnini, sum vit arbeiða við. Men sum sagt, so er enn alt ov stutt fráliðið til at staðfesta nakað. Veturin er langur í so máta, og rokna vit við, at hava funnið ein venjara áðrenn alt ov langt er útliðið, eru viðmerkingarnar, sum formaðurin hevur.

Ein annar venjari, sum eisini hevur verið settur í samband við KÍ, er Ion Geolgau, men hóast hann eisini hevur verið millum evnini, so tykist tað tó lítið sannlíkt, at hann skal venja KÍ komandi árið.

- Mær vitandi er Ion nú farin til Rumenia í feriu, og tað vildi verið løgið, um hann ikki hevði eina avtalu í skjáttuni á ferðini. Og tann avtalan er so ikki við KÍ, staðfestir formaðurin at enda.

Fyrsta flogbólts-kappingin

Flogbóltsárið byrjar um vikuskiftið, tá Fleyr skipar fyri afturvendandi FK-kappingini

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Árliga FK-kappingin í flogbólti, sum Fleyr skipar fyri, verður nú leygardagin, 28. september 2002. Kappingin er fyri liðíni í fyrstu og aðru deild hjá monnum og kvinnum.

Fyrstu deild kvinnur spæla í Gundadalshøllini kl. 9.30. 7 lið hava boðað frá luttøku. 2. deild kvinnur spæla eisini í Gundadalshøllini 11 lið hava boðað frá luttøku. Her verður leikt í 3 bólkum byrjað verður kl. 9.30. 1. deild menn spæla í høllini í Hoyvík. Spælt verður í 2 bólkum og byrjað verður kl. 9.30. 2. deild menn spæla í høllini í Læraraskúlanum 5 lið hava boðað frá luttøku.

Víðari sigur Fleyr í tíðindaskrivi, at FK-kappingin fyri meistaradeildirnar, sum er partur av steypakappingini hjá FBF, verður hildin 12. oktober.